

Iranski uttanríkisráharrin Mohamad Javad Zarif kom heim sum hetja. Nú kann oljuprísurin lækka. Mynd: EPA/BORNA QASEMI

# Iran-avtalan: Príslækkingin á olju kemur seinni

**Jógvan Hugo Gardar**

04.04.2015 - 14:06

Oljan.fo

Tá tað skírisdag gjørdist greitt at Iran og tey sokallaðu 5+1-londini vóru komin ásamt um eina kjarnorkuavtalu, so lækkaði oljuprísurin.

Eitt fat av norðsjóvaroljuni Brent lækkaði eftir lítlari løtu við heili tveimum dollarum. Eisini prísurin á amerikansku lættoljuni lækkaði.

Tað gekk tó ikki lang tíð, so var prísurin aftur á sama støði sum áðrenn avtalan bleiv undirskrivað. Tí boðini um at tað kunnu ganga mánaðir áðrenn ein bindandi avtala er komin uppá pláss, fekk oljuprísin at hækka aftur.

- Oljumarknaðurin var ov skjótur, og er nú farin at hugsa seg um. Tað er framvegis nógv eftir áðrenn avtalan er endaliga, segði Dominick Chirichella, ið er knýttur til Energy Management Insitute í New Yorm, í samrøðu við tíðindastovuna Reuters.

Eygleiðarar rokna við at tá ein endalig avtala er komin uppá pláss, so verða handilstiltøkini, ið Iran hevur liva undir í 12 ár, strikaði, og landið kann aftur selja olju frítt á heimsmarknaðinum.

Tað verður mett at Iran kann framleiða 2,8 milliónir føt av olju um dagin, men at handilstiltøkini hava avmarkað framleiðsluna til umleið eina millión føt um dagin.

Fleiri oljugreinarar sum Reuters hevur tosað við, siga at OPEC-londini noyðast at avmarka sína oljuframleiðslu, um iransk olja aftur skal floyma út á marknaðin. Annars verður úrslitið at oljuprísurin kemur at lækka munandi. Onkrir greinarar siga at um einki hendir, og Iran kemur á marknaðin fyri fullt, so kann oljuprísurin lækka við eini 30 dollarum, niður móti 20 dollarum fyri fatið av olju.